## Amerikanarar skutu eftir hvør øðrum

Tað er fleiri ferðir hent í krígnum í Irak, at amerikanskir og bretskir hermenn hava skotið eftir sínum egnu, og soleiðis var eisini fyrradagin.

Tá vórðu næstan 40 amerikanskir herflotamenn særdir, tá amerikanskir hermenn fóru at skjóta eftir hvør øðrum í einum bardaga uttan fyri býinm Nassiriya har suðuri í Irak. Ein tíðindamaður hjá fronsku tíðindastovuni AFP, sum var í fylgi við amerikansku hermonnunum, sigur, at nakrir hermenn brádliga fóru at skjóta við granatum og bumbuvarparum eftir einari aðrari amerikanskari deild. Minst 37 hermenn vórðu særdir, og sjey hernaðarakfør vórðu oyðiløgd.

Ein talsmaður hjá amerikansku herleiðsluni í Qatar segði í gjár, at tilburðurin sunnan fyri Nassiriya verður kannaður. Fyri nøkrum døgum síðani skutu bretskir hermenn eftir hvør øðrum, og tá lótu tveir hermenn lív.

## Breti bardist við irakum

Ein breti, sum bardist saman við irakum ímóti bretsku hermonnunum við býin Basra har suðuri í Irak, situr nú í bretskari fangalegu. Hann varð tikin fangi í einum samanbresti fyrr í vikuni.

Bretska herleiðslan váttar, at hon er vitandi um, at ein av fangunum sigur seg vera bretskan ríkisborgara. Sambært fjølmiðlunum á staðnum er maðurin, sum er mitt í tjúgunum, føddur í Irak, men hann skal hava búð í Manchester, og hann skal hava greitt fangavørðunum frá, at hann hevur bretskan ríkisborgararætt. Ein talsmaður hjá bretsku herleiðsluni í Irak sigur, at maðurin hevur greitt frá, at hann fór til Irak at berjast ímóti bretum og amerikanarum, tí hann er ímóti álopinum á Irak.

Í USA var alt á gosi, tá amerikanarin Jogn Walker Lindh varð tikin fangi undir krígnum í Afghanistan. Tann 21 ára gamli maðurin kom seinni fyri rættin í USA og varð dømdur 20 ára fongsul.

## Skipar fyri stuðulsgongum

Amerikanskir fjølmiðlar vilja vera við, at fjølmiðlafyritøkan Clear Channel Communications hevur skipað fyri fleiri tiltøkum, har fólk í amerikanskum býum hava gingið stuðulsgongu til frama fyri amerikansku avgerðina at leypa á Irak.

New York Times skrivar, at Clear Channel Communications hevur nýtt fleiri av sínum útvarpsstøðum til at eggja fólki til at ganga stuðulsgongu til frama fyri amerikanska átakið í Irak. Leiðslan í fyritøkuni hevur sambært New York Times sýtt fyri at gera viðmerkingar til tíðindini hjá blaðnum.

Sambært New York Times hevur Clear Channel Communications gott samband við George W. Bush, forseta. Sagt verður, at varastjórin í fyritøkuni, Tom Hicks, var stjóri í University of Texas Investment Management Company, tá Bush var guvernørur í Texas. New York Times skrivar, at bæði Bush og Hicks eru settir í samband við eina gølu, sum snýr seg um, at fyritøkur hjá Bush-ættini fingu nakrar serliga góðar vinnusáttmálar.

## ES leggur trýst á Turkaland

ES leggur seg nú óbeinleiðis upp í kríggið í Irak.

Tað hendi, tá ES-nevndin fyrradagin boðaði turkisku stjórnini frá, at ein ella onnur turkisk innrás í Irak fer at fáa álvarssamar avleiðingar fyri viðurskiftini millum Bruxelles og Ankara. Eygleiðarar tulka hetta sum eina beinleiðis hóttan um, at tyrkiska stjórnin kann gloyma alt um limaskap í ES í bræði, leggur hon seg út í kríggið í Irak.

Turkaland hevur fleiri túsund hermenn við irakska markið og hevur hótt við at lata teir fara um markið. Turkar bera ótta fyri, at kurdar fara at skipa sítt egna ríki í norðara parti av Irak, og at tað fer at elva til ófriði í tí kurdiska landspartinum har eysturi í Turkalandi.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Væntar ragnarok í Bagdad



*Bardagin um irakska høvuðsstaðin kann enda sum eitt satt ragnarok, sigur ein fyrrverandi irakskur generalur. Saddam Hussein er til reiðar at gera alt fyri at varðveita valdið, sigur hann.*

**Ein fyrrverandi irakskur herovasti væntar, at gøtubardagar í Bagdad kunnu enda í einum sonnum ragnaroki**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*

- Málið hjá Saddam Hussein er at fáa teir amerikansku og teir bretsku hermenninar inn í Bagdad at berjast úr gøtu til gøtu, sigur Abd al-Amir Abais. Hann var fyrr generalur í irakska herinum og var ein av teimum, sum stóðu á odda fyri uppreistrinum ímóti Saddam Hussein har suðuri í Irak í 1991.

Hann ávarar amerikansku og bretsku hermenninar ímóti at fara inn í sjálvan Bagdad, fyrr enn irakski leiðarin er fallin, tí tað verður ein vanlukka, sigur hann, samstundis sum hann ávarar um, at verður Saddam Hussein kroystur upp í ein krók, kann hann finna uppá at nýta evnafrøðilig vápn.

- Bygnaðurin í iraksku hermegini er skipaður við tí endamáli at varðveita Saddam Hussein við valdið. Í hesum krígnum hevur hann gjørt av at taka seg aftur úr tí syðra og tí norðara partinum av landinum, meðan alt verður gjørt fyri at verja Bagdad, skrivar Abais í einari frágreiðing, sum viðurkendi stovnurin Institute for War & Peace Reporting í London hevur almannakunngjørt.

Sambært fyrrverandi generalinum er irakska verjan skipað soleiðis, at hermenn hjá Baath-flokkinum og Jerusalem-herurin, sum tilsamans eru umleið ein millión í tali, hjálpa tí vanliga herinum at verja teir stóru býirnar. Herurin hjálpir síðani Tjóðarhirðini, sum telur umleið 70.000 mans. Hesir stuðla so aftur teirri Serligu Tjóðarhirðini, sum hevur umleið 30.000 mans, og sum hevur til uppgávu at verja Saddam Hussein í og kring Bagdad.

### Kann nýta hópoyðingarvápn

Abais sigur, at hesaferð hevur Saddam Hussein gjørt av at troytta teir amerikansku og bretsku hermenninar við at lata teir møta smáum irakskum deildum, so fíggindin viknar á leiðini til Bagdad. Hann heldur, at tað hava verið fleiri dømi um hetta seinastu dagarnar. Men fyrrverandi generalurin heldur, at tað fer at eydnast teimum sameindu at fella Saddam Hussein, um teir kringseta Bagdad og halda á við at bumba býin.

- Eydnast tað amerikanarunum at kringseta Bagdad, kann tað henda, at fólk fara at gera uppreistur ímóti stýrinum. Men fyrr verður tað ikki. Men treytin er eisini, at irakar fáa vissu fyri, at USA ikki fer at svíkja teir, eins og landið gjørdi fyri tólv árum síðani, sigur Abais.

Hann heldur eisini, at Saddam Hussein er til reiðar at tingast við amerikanarar, verður Bagdad kringsettur.

- Sýta amerikanarar fyri at tingast við hann, eri eg bangin fyri, at hann fer at nýta hópoyðingarvápn, kanska evnafrøðilig vápn. Saddam hevur altíð sagt, at tann, sum roynir at taka Irak frá sær, skal møta einum tómum landi, sigur fyrrverandi irakski generalurin.



**UTTAN ÚR HEIMI**

# Kríggið var eitt val millum pest og kolera

**-Var nakað veruligt alternativ til kríggið í Irak? Tað spyr norski søguprofessarin Olav Riste, sum heldur, at hjá amerikanarum stóð valið millum pest og kolera**



KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*

- Spurningurin er, um tað var nakað alternativ til kríggj. Trygdarráðið var samt um samtykt nummar 1441, og í henni stóð, at tað fór at fáa álvarssamar avleiðingar, gjørdi Irak ikki eftir samtyktini.

Tað sigur tann 69 ára gamli norski søguprofessarin Olav Riste, sum er granskingarleiðari á norska verjustovninum.

- Tá amerikanarar hugsaðu um »álvarssamar avleiðingar«, hugsaðu teir um kríggj, men trupulleikin var, at hini londini og serstakliga Frakland høvdu ongantíð nakað alternativ til eitt kríggj, gjørdi Irak ikki eftir samtyktini. Tá trygdarráðið gjørdi eina slíka samtykt, var tað greitt, at hetta kundi enda við kríggi, sigur Olav Riste við norska útvarpið.

Hann heldur ikki, at longd kanningartíð hjá vápnaeftirlitsmonnunum hevði verið eitt alternativ til kríggj.

- Irak er eitt stórt land, og sjálvt um fleiri eftirlitsmenn høvdu verið sendir hagar, hevði tað ikki loyst trupulleikan. Samtyktin hjá ST sigur, at Irak skal sjálvt sleppa sær av við tey ólógligu vápnini. Eftirlitsmenninir skuldu bert taka stakroyndir fyri at vita, um irakar veruliga gjørdu tað, sum teimum var álagt, sigur norski professarin.

Ein møguleiki kundi eftir hansara tykki verið at víðka tiltøkini ímóti Irak. Eitt nú kundi flogeftirlitið yvir norðara og syðra parti av Irak verið broytt, so tað umfataði alt landið, fleiri vápnaeftirlitsmenn kundu verið sendir hagar, og so kundu ST-hermenn staðið á varðhaldi á teimum ymsu støðunum, so hvørt sum eftirlitsmenninir høvdu kannað tey.

- Men einki av teimum londunum, sum týðiliga vóru ímóti kríggi, legði nakað tílíkt uppskot fram.

Ein kann spyrja, hvat teir fronsku myndugleikarnir veruliga hugsaðu, sigur Olav Riste. Spurdur, hvat hann heldur, at fransmenn hugsaðu, svarar professarin, at ivaleyst hildu fransmenn, at hetta bart var enn ein samtykt, sum kortini ikki fór at geva nakað úrslit.

### Heldur byggja brýr

Spurdur, um tað var rætt at fara í kríggj við Irak, svarar Olav Riste, at tað var eitt val millum pest og kolera.

- Varð kríggið ikki sett í verk, hevði tað verið neyðugt at linka tað hernaðarliga trýstið og harvið ásannað, at ST stóð púra máttleyst í hesari støðuni. Og vit vita av royndum, at tiltøkini ímóti Irak høvdu verið skerd fyrr ella seinni, og so hevði Saddam Hussein fingið leysar teymar at halda fram eins og frammanundan, sigur Olav Riste.

Hann ávarar norsku myndugleikarnar ímóti at fordøma USA. Heldur eigur stjórnin í Oslo at varðveita sambandið við Washington.

- Fordøma vit USA, koma vit ongan veg, tí so fer USA at gera tað, sum tað heldur vera rætt. Tað ber sjálvandi til at siga sína hugsan, men samstundis er tað umráðandi at byggja brýr, sigur norski søguprofessarin.



# USA legði trýst á okkum

*Hans Blix: - Amerikanararnir royndu at fáa okkum at gera niðurstøður, sum passaðu til teirra politikk*

**Formaðurin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum í Irak, Hans Blix, sigur, at amerikanarar vóru týðiliga argir um arbeiðið hjá eftirlitsmonnunum.**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*

Svenski formaðurin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum er sjáldsama opinskáraður í einari samrøðu, sum eysturríkska tíðarritið News hevur havt við hann, og sum tíðarritið prentaði í gjár.

- Vit fingu hurðina í høvdið. Hálvur fjórði mánaði var ikki nóg mikið, og eg haldi heldur ikki, at tað var ætlanin við samtykt nummar 1441, sigur Hans Blix við News.

Hann sigur, at hann kendi tað, sum at USA arbeiddi ímóti sær.

- Eg hevði kensluna av, at amerikanararnir vóru argir um arbeiði okkara, sigur Hans Blix. Hann sigur, at amerikanska stjórnin vildi hava eftirlitsmenninar at koma til niðurstøður, sum passaðu til amerikanska politikkin.

- Gjørdu vit ikki tað, funnust teir at okkum, sigur sviin.

Hans Blix væntar ikki, at Saddam Hussein fer at nýta hópoyðingarvápn ímóti amerikansku og bretsku hermonnunum.